

# Elvis Presley – still going strong

**Temaleygardagur: Tann 16. august í ár vórðu liðin 25 ár síðani, at Elvis presley doyði. Í temasending hjá DR2 nýggjársaftan verður lív hildið í legenduni við einum kvødlið, vígt stjørstu stjørnuni av øllum**

Elvis presley rokkar og rykkir framvegis. Hann er framvegis nummar eitt á hittlistunum – 25 ár eftir deyða sín.

DR2 fer ein túr gjøgnum Elvis-landið, Memphis, Tennessee. Frá gjøgnumbrotinum hjá Elvisi í fimmtiárunum, ið rysti alt USA í gundvøllinum og skapti ta tónleika- og ungdómsmentan, vit kenna i dag. Til tær pompøsu konsertirnar í sjeytiárunum við viðagitnum, hvítum klædningum.

### Elvis ’56

1956 var árið, tá Elves Presley hevði sítt gjøgnumbrot. Tann 19 ára gamli lastbilaførarin var ikki bara broyttur til eina super-stjørnu, men eisini til »The King«.

Amerikanski dokumentarfilmurin, »Elvis ’56«, býður upp á ein tíma við forkunnugum upptøkum og framførslum frá byrjan av kongsins karrieru. Filmurin osar av teirri villu orku, sum broytti bæði lívið hjá Elvis Presley og tónleikapallin kring heimin.

» – Áðrenn Elvis var einki«, segði John Lennon.

Í hesum filminum sæst, hvat hann meinti við hetta sitat.

### Ferðin til Memphis

Dokumentar um ein ungan, danskan Elvis-fjeppara á pílagríms-ferð til Memphis og Graceland. Sjónleikarin, Mikkel Rosenberg er 31 ára gamal og hevur lutin sum Elvis í bólkinum Elvis-live.dk.

Lagt til rættis hevur Klaus Bundgård Poulsen , og hann fylgdi Mikkel Rosenberg á super-fjepparaferðini til Memphis, sum var heimið hjá unga Elvis. Tað verður ein túrur at vitja tey støð, har Elvis búði, tá hann vaks upp. Skúlan, matstovuna, har hann át burgarar og handilin, har hann lurtaði eftir plátunum. Hvussu sær alt hetta út í dag? Ávegis greiðir Mikkel Rosenberg frá, hvussu hann er vorðin Elvisfjeppari, hóast hann bert var fimm ára gamal, tá Kongurin doyði. Ferðin til Memphis gongur eisini til Graceland, sum annars er »lukkað land« fyri sjónvarpslið.

### One Night With You

Tann legendariska konsertin, ið gav Elvis Presley eitt come-back so tað bar av eftir oyðimarkargongd í nøkur ár við vána-ligum Hollywood-filmum. Tann viðgitna konsertin frá 1968 við einum ráum Elvis í svørtum leðurklæðum og nógvum rock’n’-roll. One Night With You er konsertin í fullari longd, sum hon var, áðrenn hon varð klipt niður fyri at passa inn í tátíðar sjónvarpsshow.

### Danska sambandið

Ernst Mikael Jørgensen er maðurin, ið stýrir musikalska deyðs-búnum hjá Elvis Presley. Hann er eisin maðurin, ið er orsøkin til, at endaleysu discountútgávurnar frá sjeyti- og áttatiárunum síðani nítiárini eru skiftar um við góðskuútgávur. Hví er tað júst ein dani, ið situr og stýrir, hvat skal gevast út av Elvistilfari?

Klaus Bundgård Poulsen vitjaði Ernst Mikael Jørgensen á skriv-stovuni í New York. Her sýnir »danska sambandið« savnstilfarið og greiðir frá sínum arbeiði, sum millum annað er at reinsa gomul rábond, so tónleikurin kann gevast út í rættari góðsku.

### Graceland

Amerikanskur dokumentar um heimið hjá Elvis frá 1957 til hann doyði í 1977. Graceland er í dag eitt museum, og har starvast 350 fólk í fulltíðarstarvi. Vit sleppa aftur um fasaduna, verða víst runt, og gamlir vinir og sambond greiða frá um tíðina við Elvis. Túrurin byrjar við gittarportrið í innkoyringini, vit koma framvið viðgitnu Jungle room í kjallaranum, har stórar veitslur vóru hildnar og nógvar upptøkur vóru gjørdar. Og so er tað køkurin, har cheese-burgarar og stoktir peanutbutter-banana-sandwiches vóru tilgjørdir…